SUNDA KOMMUNA

# Kunngerð

## um broyting í byggisamtyktini fyri Norðskála-Oyri-Oyrarbakki

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Sunda kommuna á bygdaráðsfundi tann 03.12.2007 hevur samtykt, at gera niðanfyristandandi broytingar í byggisamtyktini fyri Oyrarbakka.

**Víðkan av sethúsaøki á Oyrarbakka.**

Parturin av matr. 63b, sum nú er Landbúnaðarøki, verður broytt til bústaðarøki.

Broytingarnar liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð **frá 06.12.2007 til 28.12.2007 báðir dagar íroknaðir**

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu vera Sunda kommuna í hendi í seinasta lagi 6. februar 2007.

**Sunda kommuna**



# M/S Antares til sølu við fiskiloyvum

Um hóskandi boð fæst, verður línu- og snellubáturin Antares seldur við fiskiloyvum.

Antares hevur egningarmaskinu umborð og kassalast.

Báturin er júst komin av skipasmiðju og er í góðum standi.

Høvuðsmaskinan er ein Grenaa Diesel frá 1978.

Áhugað kunnu venda sær til **Tor Shipping á telefon 35 85 31, 21 85 31 ella 21 85 30.**

TOR SHIPPING

Sp/f Tor Shipping • Niels Finsensgøta 23 • P.O. Box 1252
FO-110 Tórshavn • tel. 35 85 31 • fax 35 85 30
ww.torship.com • e-mail: torship@post.olivant.fo

SEV

# Vilt tú hava ávirkan á el-trygdina?

**Eitt starv sum eftirlitsfólk í Vestmannaøkinum er leyst at søkja til setan skjótast tilber.**

**Starvið**
Tú kemur at samskifta við el-innleggjarar og hava eftirlit við nýggjum elinnleggingum, umframt skráseting av hesum í Norðurstreymoy, Vágum og Suðuroy. Ein partur av arbeiðinum verur framhaldandi dagføring av 5Amper mátianleggum kring landið, og at veita tekniska kundatænastu. Eisini kemur tú at gera stakroyndir av elmálarum og umsita málaragoymsluna hjá SEV. SEV hevur økisskrivstovur í Tórshavn, Vestmanna, Skálabotni, Klaksvík og Vági.

**Førleikar**
Umsøkjarar skulu hava prógv sum elinnleggjari, maskinmeistaraútbúgving við starvsroyndum innan eløkið ella samsvarandi útbúgving.Vit vænta at tú hevur góðar førleikar innan krøv og gerð av elinnleggingum, góð evni at samskifta og samstarva og ert fyrikomandi.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum SEV og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum til:

Elfelagið SEV
Postrúm 319
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er fríggjadagin 14. desember 2007.**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Dánjal Jógvan Hansson á telefon nr. 346800.



# Corolla til sølu

Toyota Corolla 1.6, 110 hk, árg. 10/2003.
Sýnaður 1/11-2007. Ring og gev eitt boð.

**Telefon 211891**

MIÐVÁGS KOMMUNA

## Frá Miðvágs kommunu

# SKRIVSTOVUFÓLK

**Søkt verður hervið eftir Skrivstovufólki 50% tíð** til kommunuskrivstovuna í Miðvági at byrja skjótast gjørligt.

Lønin er sambært 3. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Vit vænta, at tú**
- hevur skrivstovuútbúgving ella annan viðkomandi lærdóm
- hevur áhuga í kommunuviðurskiftum
- hevur góð samstarvsevni, ert fryntlig/ur og fyrikomandi
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- dugir at hava nógv at gera og at arbeiða skiftandi tíðir
- dugir væl at skriva føroyskt

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna á tlf. 332429 ella borgarstjóran tlf. 221429.

Umsøknir vera, saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, at senda til Miðvágs kommunu, 370 Miðvági í seinasta lagi 20. desembur 2007 kl. 15.00.

Bygdaráðið skilar sær rætt til, um ikki nóktandi umsóknir eru, at lýsa starvið av nýggjum.

**Miðvágs Kommuna**

# Uppstillingarfundur og hugnakvøld

Verður í Eiriksgarði í Dali 7. desember 2007 kl. 20.00.

Við verður tingmanningin hjá Javnaðarflokkinum.

**Møtið fjølment!**

**Nýggir limir kunnu tekna seg.**

***Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag***

